## Suðurkoreranar vitjaðu Jarðfeingi

Nú um dagarnar fekk føroyska oljufyrisitingin Jarðfeingi heldur sjáldsama vitjan. Fleiri fólk frá suðurkoreanska oljufelagnum STX úr Seoul komu inn á gólvið í Hoyvík at avgreiða umsókn um keyp av loyvisparti hjá SHELL í leitiloyvinummWilliam har suðuri á landgrunninum. Petur Joensen, stjóri í Jarðfeingi váttar, at teir hava havt suðurkoreanar á vitjan og at hetta snúði seg um keyp av parti hjá SHELL í leitiloyinum, har Williambrunnurin verður boraður í løtuni. Herfyri kom fram, at suðurkoreanska felagið hevði samráðingar við SHELL um at keypa ein part av tess luti í William. Eisini eitt annað felag í fjareysturi, japanska oljufelagið, Sieco hevur keypt seg inn í leitiloyvi á føroyska landgrunninum. (Jan)




Føroysk toskaaling:

# Úrslitini fara at síggjast til

**- Vanliga er toskur eini 3 ára gamal og millum 55-60 sentimetrar langur, áðrenn hann gerst kynsbúgvin, men í alingini gongur alt nógv skjótari fyri seg. Tí er ein ávísur vandi fyri, at fiskurin gerst kynsbúgvin fyri tøku, og tá gerst vinnan minni lønandi, sigur Poul Vestergaard, sum starvast hjá Fiskaaling**

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á aliráðstevnuni, sum verður á Hotel Føroyum fríggjadagin, fer Ingolf Joensen, stjóri á Fiskaaling, at kunna um toskaaling í Føroyum higartil.

Aliráðstevnan byrjar klokkan 8.30 og heldur fram til umleið klokkan 16.15. Høvuðsdentur verður lagdur á, hvussu alivinnan kann optimalisera sína framleiðslu av laksi fram til tøku av fiskinum. Eftir fyrilestrarnar, sum verða fleiri í tali og koma at snúgva seg um mong ymisk viðurskifti innan aling, verður døgurði fyri luttakarunum.



*Poul Vestergaard, sum starvast hjá Fiskaaling, sigur, at meðan tað hevur gingið heldur striltið við framleiðslu av toskasmolti, er gongdin við sjálvari toskaalingini í nótum á Árnafirði og í kørum í Hvalba á leið soleiðis, sum væntandi hevur verið*

*Mynd: Fiskaaling*

### Gongur væl

Poul Vestergaard, sum starvast hjá Fiskaaling, sigur, at meðan tað hevur gingið heldur striltið við framleiðslu av toskasmolti, er gongdin við sjálvari toskaalingini í nótum á Árnafirði og í kørum í Hvalba á leið soleiðis, sum væntandi hevur verið.

Á Árnafirði, har Faroe Salmon eigur alibrúkið, svimja umleið 100.000 fiskar undan toski av Føroyabanka í nótum – og í Hvalba, har Faroe Cod Farming eigur virksemið, svimja út við 40.000 fiskar í kørum. 30.000 eru undan toski av Føroyabanka og 10.000 undan toski av landgrunninum.

Í vikuni fara 40.000 toskasmolt undan toski av Føroyabanka aftrat til Hvalbiar.

- Tað gekk eitt sindur galið við smoltframleiðsluni í fjør, har tað ikki eydnaðist so væl við startfóðringini, men vit satsa upp á, at tað verður betri í ár.

Poul sigur, at tað liggur ikki í kortunum, at fleiri toskasmolt skulu setast úr á Árnafiðri í ár, men hinvegin skulu nevndu 40.000 setast út í kørini í Hvalba.

### Ymiskar umstøður

Tað var um hálvan desember í 2006, at fiskur varð settur út í Árnafirði, meðan hvalbingar settu sín fisk út seint í januar mánaða í 2007.

- Fiskurin hevur soleiðis sama aldur, men smoltini, sum vórðu sett út í Hvalba, vóru nakað størri, tí tey vóru tað eldri.

Í Hvalba hava teir havt ávísar tekniskar trupulleikar, sum væntandi eru í byrjanini av slíkari aling, og tí hevur vøksturin kanska ikki verið hin optimali.

- Samamumtikið kunnu vit tó siga, at vøksturin bæði á Árnafirði og í Hvalba hevur verið brúkiligur – fyri ikki at siga heilt góður, sigur Poul, sum kortini ikki kennir alla gongdina í smálutum.

Hann vísir á, at toskur sum alifiskur er soleiðis háttaður, at sær hann eitt hol í nótini, rýmir hann. Hinvegin kann laksur svimja í ring – og er ikki so skjótur at rýma.

- Í Hvalba er eingin vandi fyri, at fiskur rýmir, men hinvegin kostar virksemið í pumping og hiting av sjógvi. Tú ert nærri fiskinum og sært alla tíðina, hvussu gongdin er. Eisini ber til at stýra hitanum í sjónum betri. Á Árnafirði er fóðringin sjálvvirkandi, og har síggja teir eisini fiskin um kamera og á teldu.

Fiskur, sum er aldur í kørum í Hvalba, er royndur á matstovu í Havn og sum skilst, royndist fiskurin væl.

### Takast í heyst

Poul Vestergaard sigur, at fiskurin, sum settur varð út á Árnafirði og í Hvalba fyri góðum ári síðan, nú vigar stívliga 4 pund.

- Gongst, sum ætlað, vigar hesin fiskur stívliga 8 pund í august, og tá kann hann takast, um eingi óhapp verða.

Tað verður helst torført at siga nakað neyvt um gongdina í hesi royndartíðini, fyrr enn vit koma longur út á árið, og úrslitini av hesi fyrstu útseting fyriliggja.

- Eg vóni sjálvsagt, at alingin av toski, sum nú er byrjað á Árnafirði og í Hvalba, fer at halda fram, og vit vita einki annað enn, at so verður.

Poul væntar, at sum tíðin gongur, og kunnleikin um toskaaling í Føroyum gerst størri, fara enn fleiri at vísa hesum nýggja møguleika áhuga.

- Tá ið hetta er fyrstu ferð, at toskaaling verður roynd í so stóran mun í Føroyum, er væntandi, at ymisk viðurskifti koma at gera seg galdandi, sum loysnir mugu finnast fyri.

### Kynsbúning

Poul sigur, at ein trupulleiki, sum teir, ið fáast við toskaaling, hava at dragast við, er kynsbúningin.

- Kynsbúningin hevur verið ein trupulleiki, eisini í londunum uttanum okkum,

